gult cyan magenta svart



# Føroyameistarar

**Eftir at finalurnar í FM-kappingini fyri lið vórðu leiktar fyri góðari viku síðani, er nú greitt, hvør kann rópa seg føroyameistara fyri veturin 2000/01**

BRIDGE



*Arnbjørn Sivertsen og Bogi Simonsen*

### Bólkur A (FM)

Finalurnar í FM kappingini fyri lið vóru í Klaksvík um vikuskiftið. Kappingin í 1. deild var mest sum avgjørd frammanundan. Liðið hjá Allan Dal-Christiansen hevði í innleiðandi umførunum lagt sjógv millum seg og hini liðini, og í Klaksvík róðu teir trygt sigurin í land. Á liðnum hjá Allani leiktu eisini Jóannes Mouritsen, Heðin Mouritsen, Per Kallsberg og Dánjal Pauli Mohr. Tað kann sigast, at teir vunnu kappingina suverent, hóast hon ikki var avgjørd fyrr enn í seinasti dystinum móti FARODANE, sum kundi gerast føroyameistari, um teir vunnu 25-2. Hetta var kortini ein ov stórur biti fyri liðið hjá FARODANE, sum tapti dystin 12-18. Liðið hjá Allani vann sostatt allar sínar 13 dystir í FM kappingini í ár. Tillukku allir samlir!

### Úrslit

| | |
|---|---|
| Símin Lassaberg — FARODANE | 13 — 17 |
| Carl Mikkelsen — Allan Dal-Christiansen | 11 — 19 |
| FARODANE — Carl Mikkelsen | 25 — 00 |
| Allan Dal-Christiansen — Símin Lassaberg | 24 — 06 |
| Símin Lassaberg — Carl Mikkelsen | 18 — 12 |
| Allan Dal-Christiansen — FARODANE | 18 — 12 |

### Endaliga støðan:

| | |
|---|---|
| 1. Allan Dal-Christiansen | 173 |
| 2. FARODANE | 144 |
| 3. Símin Lassaberg | 123 |
| 4. Carl Mikkelsen | 95 |

### Bólkur B (uppflyting)

Í bólki B, har tey aftastu liðini í 1.deild og tey fremstu í 2.deild kappaðust um uppflyting, hendi tað, at bæði liðini úr 2.deild fluttu upp.

Á vinnandi liðnum hjá Hanusi Bærentsen leiktu eisini Ásla Weihe, Hallgerð Hansen, Steingrím Weihe, Georg Egholm og Børge Egholm. Veteranar, ið gera eitt gleðiligt come back í 1.deild komandi ár!

Á hinum liðnum, sum kom upp, vóru Jóna Grunnveit, Jógvan Juel Rasmussen, Eyðun Jensen, Eyðun Joensen, Øssur Winthereig og Høgni Hansen.

### Úrslit

| | |
|---|---|
| Gunnar Mouritsen — Oddmar Danielsen | 25 — 03 |
| Jóna Grunnveit — Hanus Bærentsen | 15 — 15 |
| Oddmar Danielsen — Jóna Grunnveit | 21 — 09 |
| Hanus Bærentsen — Gunnar Mouritsen | 20 — 10 |
| Gunnar Mouritsen — Jóna Grunnveit | 09 — 21 |
| Oddmar Danielsen — Hanus Bærentsen | 02 — 25 |

### Endaliga støðan:

| | |
|---|---|
| 1. Hanus Bærentsen | 60 |
| 2. Jóna Grunnveit | 45 |
| 3. Gunnar Mouritsen | 44 |
| 4. Oddmar Danielsen | 26 |

### Bólkur C

Oyndfirðingarnir á liðnum hjá Halduri Ellingsgaard vunnu C-raðið. Við á liðnum hjá Halduri vóru eisini Jóannes Olsen, Oddfinn Olsen og Eirikur Joensen.

| | |
|---|---|
| Eyðun Anthoniussen — Henny Egholm | 21 — 09 |
| Haldur Ellingsgaard — Gullkonto | 23 — 07 |
| Danny Transport — John Reid Skoralíð | 23 — 07 |
| Eyðun Anthoniussen — Haldur Ellingsgaard | 17 — 13 |
| Henny Egholm — Danny Transport | 25 — 00 |
| John Reid Skoralíð — Gullkonto | 07 — 23 |
| Gullkonto — Eyðun Anthoniussen | 18 — 12 |
| Danny Transport — Haldur Ellingsgaard | 04 — 25 |
| Henny Egholm — John Reid Skoralíð | 19 — 11 |

### Endaliga støðan:

| | |
|---|---|
| 1. Haldur Ellingsgaard | 61 |
| 2. Henny Egholm | 53 |
| 3. Eyðun Anthoniussen | 50 |
| 4. Gullkonto | 48 |
| 5. Danny Transport | 27 |
| 6. John Reid Skoralíð | 25 |

### Grand Prix kappingin

Sunnudagin var opin parakapping í Klaksvík. Spæld var ein Mitcell kapping við 7 borðum. Úrslitini vóru hesi (trý tey fremstu):

**NS:**

| | |
|---|---|
| 1. Carl Mikkelsen – Jógvan Ranghamar | 155 |
| 2. Rói á Rógvu Joensen – Hans Jacob Petersen | 152 |
| 3. Robert Langgaard – Eyðun Anthoniussen | 130 |

**EV:**

| | |
|---|---|
| Jóna Grunnveit – Hallberg Arnfríðsson | 158 |
| Heðin Mouritsen – Jóannes Mouritsen | 141 |
| Marjun Restorff – Jógvan Juel Rasmussen | 136 |

Vit skulu síggja eitt av spølunum, sum varð spælt fríggjakvøldið. Tað er Bogi Simonsen, liðskipari hjá FARODANE, sum situr við róðrið.

| | | |
|---|---|---|
| N/- | Norðan<br>1073<br>J10943<br>J<br>10954 | |
| Vestan<br>A9542<br>6<br>KQ853<br>87 | | Eystan<br>QJ86<br>AK8<br>A942<br>KJ |
| | Sunnan<br>K<br>Q752<br>1076<br>AQ632 | |

NS: Rói á Rógvu Joensen — Símin Lassaberg
EV: Bogi Simonsen — Niels Nielsen

| V | N | E | S |
|---|---|---|---|
| - | pass | 1 rú | pass |
| 1sp | pass | 2 ut | pass |
| 4 rú | pass | 4 ut | pass |
| 5 sp | pass | 6 rú | pass |
| pass | pass | | |

2ut meldið kann tykjast eitt sindur løgið, tá man hevur 4 lit við makkaranum í spaðara. Tey flestu av okkum høvdu lest meldað 3 ella 4 sp. Men Bogi vildi á henda hátt hava makkaran at vísa, um nakar áhugi var fyri slemmi. 4 rú hjá Niels vísa slemmáhuga. 4 ut spyr eftir essum. 5 sp lovar tvey ess av fimm (rú K er eitt ess) og trumf frúgv. Bogi kundi nú tað sama meldað 6 sp, men fyri at verja fyri einum útspæli í kleyvara gjøgnum KJ, valdi hann at melda 6 rú.

Útspælið var trumfur. Bogi tók trumf og hj AK, har hann kastaði ein kleyvara á borðinum. Nú skuldi spaðaraliturin loysast — spQ til kong og ess, og tá Bogi síðan klípti sp 10 gjøgnum Norðan, var kontraktin heima. Mótspælið fekk bara fyri kl A.

Við hitt borðið spældi Eystan 6 sp, sum kundi farið niður beinan vegin, um kleyvari kom út. Norðan valdi at spæla singleton rútara út, men kontraktin fór hóast tað niður, tá spælførarin gitti galið í spaðara.

### FM fyri pør

7. apríl verður FM-semifinalan fyri pør leikt í Bridgehúsinum í Havn. Byrjað verður at spæla fyrrapartin kl. 10.00. Tilmelding fer fram í Bridgehúsinum ella hjá Marjun Restorff tel. 31 91 42 í seinasta lagi mikudagin 4. apríl.



*Teir fimm, sum vóru á liðnum, sum vann FM-kappingina fyri lið: F.v. Allan Dal-Christiansen, Jóannes Mouritsen, Heðin Mouritsen, Per Kallsberg og Dánjal Pauli (Balle) Mohr*

# Møguleiki at hyggja

**Fríggjadagin verður møguleiki at síggja dystin hjá føroyska landsliðnum móti Russlandi á sjónvarpsskíggja**

LANDSDYSTUR
*Jákup Mørk*

Tað mundi ivaleyst vera mong, sum harmaðust, at SvF ikki kundi senda beinleiðis, tá landslið okkara fyri viku síðani dystaðist á Luzjniki Stadion í Moskva. Úrslitið var sum kunnugt avbera gott, og hóast tapið høvdu føroysku leikararnir alla orsøk til at vera ernir av avrikinum.

Føroyskir sjónvarpshyggjarar hava havt møguleika at sæð brot frá dystinum, men enn hevur so ikki verið gjørligt at síggja allan dystin. Hetta hevur 12. maður nú tikið stig til, og fríggjakvøldið klokkan 20.00 verður B36-húsið karmur um eina seinkaða sýning av dystinum.

Formaðurin í 12. manni, Regin Egholm, sigur, at tað eru nógv fólk, sum hava spurt seg fyri, um ikki onkur møguleiki er at vísa dystin. Víðari sigur hann, at tað umvegis Ivan Moskalenko, sum í trý ár hevur búð í Føroyum, hevur eydnast at fingið fatur á einum sjónbandi við dystinum, og er tað hetta, sum klokkan 20.00 verður sett í videospælaran í B36.

Regin er sum vera man fegin um hendan møguleikan, og vónar hann, at nógv fólk verður at síggja í B36 húsinum.



*Var tað brotsspak. Met sjálv/ur, tá dysturin millum Russland og Føroyar verður sýndur í B36-húsinum fríggjakvøldið*



# FM- fyri yngri deildir

**FM kappingarnar hjá yngru deildunum í flogbólti vórðu avgreiddar um vikuskiftið**

FLOGBÓLTUR
*Tíðindaskriv*

Um vikuskiftið hevur Flogbóltssamband Føroya skipað fyri føroyameistaraskapið fyri yngru deildirnar, og var luttøkan aftur í ár met. Samanlagt hava 101 lið luttikið í FM í ár fyri tær yngru deildirnar, so hetta er ein stór framgongd í mun til fyri 3 árum síðani, tá umleið 65 lið luttóku. Tann størsti bólkurin var aftur hesaferð gentur 12 ár, har íalt 29 lið vóru tilmeldað.

### Sjúka darvaði

Men tíanverri møttu ikki øll liðini, tí influensa herjar millum føroyaska ungdómin í løtuni. Tað vóru tí nøkur lið sum góvu avboð og ikki møttu, og hetta darvaði kappingini eitt sindur, men tó ikki so nógv, at hetta fekk álvarsligar fylgjur.

### Í tríggjar dagar

Kappingin var leikt í Havn og leikt var frá fríggjakvøldi til sunnudag á íalt 9 vøllum og vinnararnir vóru hesir í ymsu deildunum. Tað skal viðmerkjast, at aldurbólkurin 16 ár bert luttók í eini steypakapping, tí hesin aldursbólkurin hevur luttikið í leypandi landskapping alt árið. Tíverri hava vit ikki myndir av hesum aldursbólkinum, men viðmerkjast skal kortini, at Gullið fór til Fleyr, sum í finaluni vann á SÍa. Bronsuna í hesum bólki vann SÍb. Annars hava vit myndir av øllum hinum vinnarunum her á síðuni.

Serliga innan yngru bólkarnar er leikliga gongdin í stórari menning, og Flogbóltssambandið upplýsir, at tað komandi ár verður lagdur størri dentur á venjaraútbúgvingina, og í hesum sambandi er samarbeiði tikið upp við Dansk Volleyball Forbund eins og samstavið við DGI heldur áfram.



*Dreingir 12. Gull: Fleyr, Silvur: Mjølnir, Bronsa: SÍ*



*Gentur 14, Gull: TB, Silvur: KÌF, Bronsa: SÍ*



*Dreingir 9, Gull: TB, Silvur: Fleyr, Bronsa: SÍ*



*Gentur 12, Gull: Mjølnir, Silvur: TB, Bronsa: Dráttur*



*Kvinnuunglingar, Gull: TB, Silvur: KÍF, Bronsa: Fleyr*



*Gentur16 (steypavinnarar), Gull: KÍF, Silvur: Dráttur, Bronsa: Fleyr*



*Mansunglingar, Gull: Fleyr, Silvur: Fram, Bronsa: Nøvan*



*Dreingir 14, Gull: SÍ, Silvur: Mjølnir, Bronsa: TB*



*Gentur 9, Gull: TB b, Silvur: TB a, Bronsa: Fleyr*

gult cyan magenta svart